## DAGSINS MEINING

# Lýsingin

Ein lýsing frá Tjóðveldisflokkinum í Sosialinum í gjár hevur skapt mikla øði millum manna. Formaður floksins sigur alment frá, at flokkurin hevur onga ábyrgd av lýsingini og vísir frá sær innihaldið í henni. Vit ivast heldur ikki í, at hetta er rætt. Tað er gott, at Tjóðveldisflokkurin er so mikið at sær komin, at hann alment tekur avstand frá innihaldinum í hesi ótespiligu lýsing, men harmiligt er, at teir ikki fara at rannsaka, hvat tað er, ið ger, at ein slík lýsing yvirhøvur verður gjørd.

Tað áhugaverda í hesum málinum er, hvussu tað ber til, at nakar yvirhøvur finnir uppá at gera eina slíka lýsing. Lýsingin tosar ikki til tað hægsta í okkum menniskjum og sigur beinleiðis, at ein politiskur flokkur ella floksformaður er meira føroyskur enn aðrir. Slíkt átti at fingið allar alarmklokkur at ringt og átti at givið orsøk til sjálvrannsakan millum tey, ið hava gjørt lýsingina og eisini átti Tjóðveldisflokkurin at umhugsað, hvat fyri boðskap man sendir og hevur sent til Føroya fólk, við grovum skuldsetingum móti øðrum flokkum um lygn og landskassatøming.

Eitt er vist, og tað er, at lýsingin er ikki vorðin til av sær sjálvum, og at hon ivaleyst er gjørd av onkrum, ið vil Tjóðveldisflokkinum tað besta.

Lýsingin setir viðmerkingarnar, ið hava verið í seinastuni, móti formanni Javnaðarfloksins, í perspektiv, tí hann hevur ávarað ímóti, at fólk flokka føroyingar í “rættar føroyingar” og onnur. Lýsingin í gjár vísir, at onkur í hesum samfelagnum ger júst tað, ið formaður Javnaðarfloksins hevur ávarað ímóti.

Vónandi verður sjálvrættvísi og avnoktan lagt á hyllina til frama fyri sjálvrannsakan. Hvussu ber tað til, at nakar kundi finna uppá at gera eina slíka lýsing í Føroyum í 2002?

Tað er gott, at leiðslan í Tjóðveldisflokkinum tekur avstand frá innihaldinum í óhepnu lýsingini, men vónandi gevur hetta orsøk til rannskan av boðskapum og hvussu slíkir boðskapir kunnu uppfatast ella misfatast. At spæla fornermaður og lata sum um, at eingin í Føroyum kundi funnið uppá at flokka føroyingar í “rættar føroyingar” og onnur, er at stinga høvdið í sandin. Lýsingin í gjár vísir, at onkur – um enn eitt fátal – finnur uppá slíkt. Um tað bara snýr seg um ein einkultan persón, so er tað ein persónur ov nógv.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Heyganeshandilin í Vestmanna



**Ólavur á Heygum**
*Greve, hin 22. apríl 2002*

Eg fari at biðja um innivist fyri eitt áhugamál, sum hevur hugtikið meg í tí seinustu skrivingini viðvíkjandi varðveitan av fornminninum Heyganeshandilin í Vestmanna.

Allarfyrst vil eg siga, at sjálvt um eg eri vaksin upp á Tvøroyri, var eg ofta hugtikin av tá ið eg sum smádrongur og undir uppvøkstri sá hendan stásliga bygningin heyganeshandilin.

Tá ið eg so eisini bleiv kunnugur søguna um hendan bygning og alt tað virksemi sum kom her frá. Handil, sleipistøð til skip, reidarí og mangt annað, ja so bleiv Heygahandilin fyri mær eitt monument, sum manifesteraði alt tað, sum tá á døgum mátti verda ein av størstu framstig í Føroyum.

Sum mangun kunnugt, í Vestmanna, eru myndir frá hesum stásligu bygningi eitt prýði fyri bygdina, líkasum fólk aðrastaðni frá, fóru til Vestmanna, fyri at síggja hendan bygning. Tað var tann einasti bygningur og er tann einasti bygningur í Føroyum, sum hevur hendan akitektoniskan stíl, sum stavar frá Hamburg í Tysklandi Bert vid hesum sjónarmiði man verða eitt avgerandi sjónarmið fyri Fornminnismyndugleikun, at varveita.

Eg havi tíverri lisið tjakið um hettar mál bæði frá Bjørn og borgarstjóranum, Gunn Joensen, í Vestmanna. Tað er onki so oyðileggjandi sum klandur og stríð. Góðu tit bæði, lat tað ikki blíva persónligt. Tað førir ikki til nakað at geva hvørjum øðrum skyldina, tí so verður tað ikki málið tit stríðast um, men okkurt persónligt.

Tað sum eg fái burtur úr tjakinum er, at har er for nógv tos og tíðin fer frá tykkum, líkasum bygningurin, sum Gunn sigur, er farin illa, av tí, at kommunan sum eigur bygningin, ikki hevur gjørt nakað viðlíkahald. Eg skilji á Bjørn, at stórviðurin er frískur, medan klædningurin skal endurnýggjast, so har er onki sum dettur sundur.

Farið nú undur og setið eina nevnd niður, við tí fyri eyga, at skaffa pening til at fáa bygningin aftur, sum hann var. Tað eru nógvir grunnar, sum stuðla slík mál, ikki minst í útlondum. Tað skuldi ikki undrað meg, um týskarar vóru áhugaðir, um teir vistu, at slíkt minni fannst í Føroyum

Tað ber eisini til at senda spurningarblað út til bygdina, um at fáa fólk til frívilligt arbeidi. Tað var ein ættarstevna í Vestmanna, sum eg luttók til. Har vóru 560 fólk komin saman. Hvat um tey fingu hendan spurning og eftur førimuni studlagu, kanska við peningi ella arbeidi. Tad vóru nógv vøkur ord um Heyganes tá. Hvat um vit øll vóru við, saman vid kommunini fyri at hjálpa til, so ikki kommunan stendur einsamøll um alt.

At enda vil eg siga, at tit í Vestmanna fara ikki at angra tað. Tit skula vita, at tað er ikki fyri okkum núlivandi men tey seidnu ættarlidini fara at gleðast at hoyra søgur frá hesum bygningi.

Eg havi nú búð 42 ár í Danmark. Tá so eg eri onkuntíð í Føroyum, so siga døtrur mínar ofta. At tað sum hugtekur tær mest, er at tað sum eg havi fortalt teimun, fær eina heilt aðra diminsión, tá tey til dømis síggja tað søguligu bygningar vid teirra egnu eygum. Pápi her sum eg gangi hava tey, sum tú hevur fortalt um, eisini gingið.

At enda vil eg bara sitera tað, sum stendur í sanginum.

*”Latið ei søguna doyggja,*
*goyma hana so væl*
*Í dreingja sinni og*
*moyggja, hon miki útrætta*
*skal”.*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Íbúðartørvurin sera einfaldur at nøkta

**Politikarar hava av álvara sovið í tímanum í bústaðarmálinum!**

**Roar Heini Olsen**
*Valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoy*



Sum øllum kunnugt er tað alt ov dýrt at keypa ella leiga sær okkurt at búgva í og seta føtur undir egið borð, ikki minst í miðstaðarøkinum. Serstakliga hart rakt eru ung lesandi, støk, einligir forsyrgjarar, ungar familjur og tann parturin av teimum eldru, sum ikki hava eina munandi uppsparing á kistubotninum. Hetta gevur annars púra óneyðugar trupulleikar við dýrum og mangan vánaligum og heilsuskaðiligum kjallaraíbúðum, ofta fyri okurspris. Tá livikostnaðurin gerst so høgur er minni eftir til sunnan mat, klæðir, hita og annað, sum kann tryggja familjuni trivnað. Annað er, at høgir kostnaðir økir lønarkrøvini í samfelagnum og ger føroysku tjóðina minni kappingarføra við útlond.

Samstundis er íbúðartørvurin eitt av fáum økjum, sum ikki krevur munandi upphæddir á fíggjarlógini men nærum bert hugflog, gott samstarv við kommunurnar og politiskan vilja at loysa. Tí vit hava í veruleikanum longu amboðið til at loysa trupulleikan, nevniliga Húsalánsgrunnin og Íbúðargrunnin, umframt at landið umvegis Jarðarráðið eigur ovmikið av almennari jørð til bygging, í hvussu er í Suðurstreymoy. Útboðið átti at verið fleiri ferðir eftirspurningin, soleiðis at grova spekulatiónin í grundstykkjasølu kundi tálmast. Og við meðalúrtøku í haga uppá eitt lamb fyri hvørjar 30-40.000 fermetrar árliga, átti endurgjaldið fyri mistar inntøkumøguleikar á festunum púrt einki at týtt fyri grundstykkjakostnaðin, sum fyri tað kundi verið undir 1.000 kr. fyri alt grundstykkið.

Nevndin í Húsalánsgrunninum eigur stóra tøkk uppiborna fyri at hon við hugflogi og idealismu er farin undir at tilvirka uppskot, sum kunnu gera grunnin til amboð fyri at loysa tann mest akutta tørvin, í fyrsta umfari við alternativum bústaðum til eldri, soleiðis at tey mangan alt ov stóru hús, sum hesi sita í, eftir at børnini eru flutt heimanífrá, kunnu gerast leys til størri familjur.

Í staðin fyri bara at klikkja niður á Húsalánsgrunnin áttu politikarar at stuðla hesum ætlanum, sum teir sjálvir áttu at havt gjørt nakað við. Eftir at bankarnir eru farnir at heildarfíggja hús, eru útlánini hjá Húsalánsgrunninum eftir fáum árum minkað úr 800 niður í einar 300 mill. kr., nøkurlunda samsvarandi eginpeninginum hjá Húsalánsgrunninum. Grunnurin hevur tí møguleika fyri at gerast amboðið til at loysa bústaðartrupulleikan einaferð med alla. Við solvenskravi uppá 8-10 %, kann Húsalánsgrunnurin fíggja alternativari húsabygging fyri 3 milliardir, og kostar hvør alternativur bústaður 500.000 at byggja, og komandi lutaeigarar sjálvir fíggja 40-50% av hesum, kann Húsalánsgrunnurin sostatt fíggja ikki minni enn 10-12.000 alternativum bústaðum av hesum slag, umframt tey lán til vanlig sethús, sum grunnurin í dag fíggjar. Hetta tykist vera meira enn ríkiligt til at nøkta verandi tørv, og hevði Húsalánsgrunnurin tí kunna farið inn í fleiri sløg av fígging av alternativari bygging, alt eftir, hvussu stóran part teir eintøku bólkarnir metast sjálvir at megna at útvega, soleiðis at tørvurin hjá flestu veiku bólkum í samfelagnum kundi nøktast, eisini teimum sálarligu sjúku, soleiðis sum víst verður á í álitinum Glotti Fyri Framman. Tey, sum als einki megna at fíggja sjálvi, høvdu soleiðis eisini kunna komið uppí part við at fingið leiguíbúðir.

Húsalánsgrunnurin hevur munandi lægri umsitingarkostað enn bankarnir við teirra nógvu og fínu filialum, og hevði grunnurin fingið loyvi til tess, fríari teymar yvirhøvur og at víðka sítt virksemi, hevði hann í veruleikanum kunna fíggja bústaðir nógv bíligari enn bankarnir, sum fyri 2. og 3. veðrættarlán í løtuni taka okursrentu uppá 7,75 og 8,75%, hóast Diskontorentan, sum teir læna fyri uttanlanda í løtuni er 3,75% og innlánsrentustigið hjá spararunum er samsvarandi lágt. Einki undur í, at teir eru so dugnaligir at fáa stórt avlop. Teir lata tykkum, húsaeigarar gjalda veitsluna.

Tey fáu, sum hava víst Húsalánsgrunninum ans, hava tíverri lagt fótonglar út fyri arbeiðinum hjá grunninum.Um tørvur á at gera tillagingar í lógargrundarlagnum fyri Húsalánsgrunnin, so er bara at gera tað og ongantíð ov skjótt, tí tað er tíð uppá, at onkur ger nakað við trupulleikan, sum politikararnir til stutt undan valinum hava víst fullkomiliga líkasælu annað enn at leggja fót fyri hesum arbeiði.

Brúkið høvdið, tá tit í dag fara á val, og veljið við hjartanum.

# Skipað lív, heilsa og dagliga lívið v.m.

**Hans Birgir Hansen**



Tað er mangt at avklára í øllum lívsins viðurskiftum og dagligum fyribrigdum. Ein má skipa lív, heilsu, vælveru, arbeiði, forrætning, frítíð og privatlív v.m.

Tað hevur støðugt gingið framá hesi seinastu árini, tá ein hevur skrivað lesarabrøv til bløðini. Hetta hjálpti uppá støðuna, ið fekk arvafíggindar at ignorera ein.

Tað hava verið byrjunartrupulleikar við øllum etableraðum lívsviðurskiftum og dagligum fyribrigdum, so sum lívið, heilsu, vælveru, arbeiði, forrætning, frítíð, privatlívið.

Tað hevur kostað ómetaliga nógv at náa tað støði, ein í dag er komin á. Ein hevur verið fyri fíggjarligum tapi vegna lívslanga arvastríðið í Havn.

Tað eru nógvar uppgávur, ið liggja á láni at fáa loyst, við atliti til alt tað, ein tekst við í tí dagliga lívi og í forrætnings, frítíðar, privatlívi her í Havn.

Tað er neyðugt, skal ein koma víðari í dagliga arbeiðs-, forrætnings-, frítíðar-, privatlívið her í Havn og fáa etablerað forrætningsavtalur/-sambond.

Tað verður ein harður kostur at liva sum ein býarmynd í Havnini í øllum tí áðurnevnda. Ein ynskir at sleppa frá tí ráða mannalyndinum.

Tað er nógv, ein skal avklára við arbeiðsmarknaðin, búskapin, samfelagið, húsarhaldið, handils- og vinnulívið, ídnaðin v.m., ið hevur eins stóra áhuga.

Tað skal støðugt ganga fram á í komandi tíðum við at skunda undir tær ráðandi kreftir, myndugleikar, vøld, almenningar ein stríddist við.

Tað er gott mót, ein hevur uppá lívið, og ein lærir so leingi ein livir og virkar og gevur sína lívsvitan og royndir til blaðlesarar kring landið.

Vit skulu øll greiða egnu lívsviðurskiftir og skipa lív, heilsu, arbeiðs, forrætnings, frítíðar, privatlív.


